# 60’ini komin í vaksnamannárini




*So eru 60’ini aftur á skránni. Hesaferð við Silly Boys og Enjoyers á pallinum*

**Silly Boys og Enjoyers stýra pallinum - og gólvinum, nú Neistin átjanda árið á rað skipar fyri ferð aftur í trýssini**

60’INI
*Jákup Mørk*

Tað byrjaði sum eitt tiltak, ið einans var ætlað sum eitt hugnaligt fríggjakvøld í 1988. Neistin við Vagni Michelsen á odda skipaði fyri 60’ara dansi, og at spæla høvdu teir fingið Faroe Boys, Cream Crackers og Twilight.

Tað stóð tó skjótt greitt, at Neistin við hesum hevði rakt beint á papageykin. Eftir tveimum døgum vóru atgongumerkini til kvøldið útseld, og so varð leygarkvøldið eisini sett á skránna.

Og eftir søguliga fyrsta árið, hevur eingin ivast í, hvat 60’ini eru fyri eitt tiltak. Eins trúføst og til ólavsøkku hava fólk úr øllum landinum, bindiklubbar og grannaløg ferðast til høllina á Hálsi, tá árliga tiltakið hevur verið á skránni. Til dans og gaman, reyp og nostalgi. Ja, snøgt sagt, so hava fólk leita sær aftur til ungdómin aftur. Eisini hóast føðibrævið kanska hevur sagt, at talan ikki longur er um »ungdommens vår« longur.

**Silly Boys**

Og hetta vikuskiftið stendur tiltakið so aftur á skránni. At spæla til dansin hesaferð eru Silly Boys og Enjoyers, og hóast gamlir í garði, so er einki at ivast í, at fáir dugdu at swinga í 60’unum eins og teir.

Silly Boys byrjaði í 1961 í einum kjallara í Fuglafirði, og við Jóannes í Innistovu sum sangara og frontfiguri setti bólkurin sín avgjørda dám á dansiumhvørvið í sekstiárunum. Teir góvu at spæla í 1970, og við einum undantaki – Skansastovukonsertin í 1978 – var friður frá teirra síðu, fram til Neistin í 1989 fekk teir á pallin.

Og her verða teir so aftur í ár. Hóast teir ikki allir eru í Føroyum longur, so ber til at fáa flogferðaseðlar at binda alt saman við, og so er lag á manni. Manningin í bólkinum um vikuskiftið verður: Stanley Samuelsen, Magnus Jacobsen, Óli Johannesen, Jónsvein Poulsen og Torkil Johannesen.

**Enjoyers**

Enjoyers eru fyri fjórðu ferð partur av tiltakinum. Hesin bólkurin byrjaði í Havn, har Djóni Andreasen, Hans Christian Clementsen, Birgar Johannesen og Steingrím Abrahamsen gjørdu av at royna seg.

Teirra tónleikur er kanska ikki heilt so rokkutur, sum hann er hjá Silly Boys. Talan er meira um instrumentalar sjelarar, sum við góðum íblástri frá the Shadows ivaleyst kunnu fáa mong 60’ara hjørtu at blotna.

Sangur verður tó eisini við í skránni hjá enjoyers, og er tað altíð fúsi Robert McBirnie, sum stendur fyri hesum.

So samanlagt man lítil ivi vera um, at rættur 60’ara dámur aftur verður á Hálsi hetta vikuskifti.




**KLAKSVÍKAR KLUBBI**



Tel 455681

**Hósdagin:**
**Kl. 19.30 Livandi tónleikur**
*við Sámal Ravnsfjall*

**Fríggjadagin:**
**Fimmari við ókeypis ábiti**
**Sjavskapping**

**Leygardagin:**
**Fótbóltur á stórskíggja**
**Dansur** *við GoGo Blues*

**Sunnudagin:**
**Opið Hús**

Sosialurin 341800